# Evropa skyldina av yvirgangi

Evropa fekk av at vita á landsfundinum hjá republikanska flokkinum í USA, har altjóða yvirgangur hevur verið eitt av høvuðsevnunum.

Fyrrverandi borgarstjórin í New York Rudolph Giuliani var serliga hvassorðaður. Hann segði, at evropeararnir eiga meginpartin av skyldini av, at yvirgangur yvirhøvur er til í 2004. Giuliani vísti á, at í teir palestinsku yvirgangsmenninir, sum lupu á tey jødisku ítróttarfólkini á olympisku leikunum í München í 1972, vórðu latnir leysir longu tveir mánaðir seinni. Hann nevndi eisini, at yvirgangsmenninir, sum søktu at ferðamannaskipinum »Achille Lauro« í 1995, vórðu eisini latnir leysir eftir stutta tíð. At enda vísti hann á, at Yasser Arafat fekk Nobelfriðarheiðurslønina í 1994, sjálvt um hann tók undir við yvirganginum í Miðeystri.

– Yvirgangsmenninir hava lært, at teir kunnu hótta heimssamfelagið, og serliga evropearar hava verið skjótir at slaka, segði Rudolph Giuliani, sum var borgarstjóri í New York, tá yvirgangsmenn oyðiløgdu World Trade Center fyri trimum árum síðani.

# Avrættingar byrja aftur

Ísraelsku myndugleikarnir fara nú aftur at beina fyri víðgongdum palestinskum leiðarum, søgdu trygdarkeldur í Jerusalem í gjár.

Fyrr í ár beindu ísraelsmenn fyri tveimum leiðarum í felagsskapinum Hamas. Nú verða avrættingarnar tiknar uppaftur, tí Hamas hevur kunngjørt, at tað vóru hansara limir, sum skipaðu fyri teimum báðum sjálvmorðsbumbuatsóknunum at tveimum bussum har suðuri í Ísrael fyrradagin. 16 fólk doyðu í atsóknunum, og meiri enn 80 fingu skaða.

Sambært teimum ísraelsku trygdarkeldunum hava myndugleikarnir ikki hildið so neyvt eyga við teimum víðgongdu leiðarunum í seinastuni, tí herurin hevur havt úr at gera við at stríðast ímóti øðrum palestinum. Men nú verður lagt á annan bógv, siga keldurnar.

# Í kríggj við grashoppur

Fleiri lond har vesturi í Afrika fyrireika seg nú til ta ringastu grashoppuinnrásina seinastu 15 árini.

Forsetin í Senegal, Abdoulaye Wade, sigur við tíðindastovuna AP, at tey vesturafrikonsku londini noyðast at biðja herin taka sær av teiomum nógvu grashoppunum. Týsdagin kom tann fyrsta bylgjan av grashoppum til senegalska høvuðsstaðin Dakar. Á vegnum hagar hava tær oyðilagt alla grøði, og ST sigur, at Senegal og hini londini mugu fáa minst 700 milliónir krónur í hjálp, skulu tey vinna bardagan ímóti grashoppunum.

Men senegalski forsetin vil ikki hava pengar. Hann vil heldur hava flogfør, sum kunnu fara í bardaga við grashoppurnar. Vit eru í kríggi, og tað hevur skund at basa fíggindanum, sigur hann.

# Funnu 1700 ára gamlan mann

Danskir fornfrøðingar hava funnið beinagrindina av einum manni, sum bleiv jarðaður í Høje Taastrup á Sælandi fyri 1700 árum síðani.

Maðurin var 169 sentimetrar til hæddar, og hann var ímillum 20 og 30 ára gamal, tá hann doyði. Fornfrøðingurin Anne Hansen sigur við Politiken, at beinagrindin er sjáldsama væl varðveidd. Í kistuni funnu fornfrøðingarnir eisini eina krukku, og út frá mynstrinum á krukkuni hava teir staðfest, at maðurin bleiv jarðaður einaferð í fjórðu øld. Anne Hansen sigur, at maðurin hevur havt góðar tenn, og tað bendir á, at hann hevur etið góðan mat, sigur hon.

Tann 1700 ára gamla beinagrindin skal nú kannast. Millum annað er ætlanin at vita, um maðurin leið av onkrari sjúku, eftir sum hann doyði so ungur.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Svørtu einkjurnar herja Russland



**Russisku myndugleikarnir eru ikki í iva um, at tað eru tær sokallaðu »svørtu einkjurnar« úr Kekenia, sum hava staðið fyri yvirganginum teir seinastu dagarnar**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Gjáramorgunin tóku yvirgangsfólk meiri enn 200 skúlabørn og umleið 40 foreldur gíslar í einum skúla í býnum Beslan har suðuri í Russlandi. Tað eydnaðist umleið 50 børnum at sleppa til rýmingar, men yvirgangsfólkini sýttu fyri at lata hini leys. Tey vildu heldur ikki samráðast við myndugleikarnar og hóttu við at spreingja skúlan í luftina, leyp løgreglan á.

Myndugleikarnir hildu í gjár, at gíslatakararnir vóru umleið 20 í tali, og at fleiri kvinnur vóru teirra millum. Í fyrstani ljóðaði, at umleið 400 børn vóru í skúlanum, men seinni søgdu myndugleikarnir, at 240 børn og 40 foreldur vóru í skúlanum, tá yvirgangsfólkini lupu á. Børnini eru ímillum sjey og seytjan ára gamul, og fleiri teirra skuldu hava sín fyrsta skúladag í gjár.

## Svørtu einkjurnar

Belsan er bara einar 50 kilometrar frá kekenska markinum, og tí var eingin ivi um, at tað vóru tær sokallaðu »svørtu einkjurnar« úr Kekenia, sum einaferð enn høvdu gjørt vart við seg.

Russiska trygdartænastan er sannførd um, at tað vóru tvær »svartar einkjur«, sum sprongdu tey bæði flogførini í síðstu viku, og at tað var ein av starvssystrum teirra, sum sprongdi eina bumbu uttan fyri undirgrundarstøðina í Moskva fyrradagin. Hesar tríggjar atsóknirnar kostaðu meiri enn 100 mannalív.

Trygdartænastan segði í gjár, at tær báðar kvinnurnar, sum sprongdu flogførini, og kvinnan, sum sprongdi bumbuna í Moskva, komu til Russlands ísenn. Ein fjórða var saman við teimum, og henni hevur trygdartænastan leitað eftir. Í gjár bleiv gitt, at hon kanska var ímillum teirra, sum tóku gíslarnar í skúlanum í Balsan.

Islamski felagsskapurin Islambouli-brigadurnar hevur átikið sær ábyrgdina av atsóknunum ímóti teimum báðum flogførunum og undirgrundarstøðini í Moskva. Felagsskapurin sigur, at atsóknirnar eru hevnd fyri tann harðrenda politikkin hjá russum í Kekenia. Um felagsskapurin eisini hevði ábyrgdina av gíslatøkuni í Belsan var ikki greitt í gjár.




# Florida bíðar eftir Frances

**Fyri 14 døgum síðani herjaði tropiska ódnin Charley Florida. Nú er Francis á veg, og hon kann gerast uppafur verri**

ÓDNARVEÐUR
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Veðurmenninir hava flokkað Francis í tað, teir kalla bólk fýra. Charley, sum rakti Florida fyri 14 døgum síaðni, var í sama flokki.

Amerikonsku veðurmenninir vænta, at Francis fer at herja Bahamas í morg-in, og at hon fer at raka strondina í Florida og Georgia sunnudagin. Í Florida hava myndugleikarnir givið fólki boð um at fyrireika seg, sjálvt um mong framvegis ikki eru liðug at rudda eftir tær stóru oyðileggingarnar, sum Charley hevði við sær. Hildið verður, at skaðin tá kostaði einar 40 milliardir krónur.

Fyrradagin herjaði tropiski stormurin Gaston statin Virginia, har illveðrið kravdi fimm mannalív. Nógv hús vórðu oyðiløgd, og bæði vegir og elveitingar fóru illa.



# Ljósafelli til sølu

**Frystitrolarin Ljósafelli er í ferð við at verða seldur til eitt føroyskt felag, váttar Mortan Johannesen, reiðari**

FISKIVINNA
*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*



*Tað bendir tann vegin, at Ljósafelli fer at skifta eigarar, men skipið verður framvegis á føroyskum hondum*

Reiðaríið hjá frystitrolaranum 'Ljósafelli' váttar at ein søla av skipinum er í umbúna. Sum skilst er manningin á Ljósafelli øll uppsøgd í sambandi við ta ætlaðu søluna, sum sostatt tykist vera komin væl áleiðis. Tó kunnu vónir vera fyri at tey 28 arbeiðsplássini verða varðveitt, meinar reiðarin, Mortan Johannesen. Uttan at vilja nevna keyparan við navni, upplýsir hann at talan er um eitt føroyskt felag.

– Eg kann ikki annað enn vátta at vit umhugsa at selja Ljósafelli, segði Mortan Johannesen.

– Hóast vit hava sagt mannskapið upp, so er alt enn ikki endaliga avgreitt, legði reiðarin afturat og vísti til eina roynd at selja skipið til Grønlands fyri 12 árum síðani; tá kom trolarin nevniliga retur.

– Enki bendir á at tað føroyska felagið sum keypir skipið hesuferð er í líknandi støðu fíggjarliga sum tann grønlendski keyparin á sinni, men sum sagt er alt ikki endaliga avgreitt enn. Skipið hevur ikki kastað av sær teir heilt stóru pengarnar men tað hevur staðið seg, og givið 28 arbeiðspláss. Okkara vón er at ar-beiðsplássini verða varðveitt hjá tí reiðarínum sum keypir skipið.

Ljósafelli hevur millum annað roynt eftir svartkalva við Flemish Cap og kongafiski í Irmingarhavinum hesi seinastu árini. Fiskiskapurin hevur verið hampiligur, hóast Flemish Cap gav óvæntað lítið í ár. Trolarin hevur einans fiskiloyvi uttan fyri tað føroyska 200 fjórðinga fiskimarkið men hevur tó klárað seg, millum annað við hjálp av kvotu frá hinum skipinum hjá Mortan Johannesen, Enniberg.

– Tær mest attraktivu leiðirnar eru ofta tær ið liggja innan fyri okkara 200 fjórðingar; men sæð út frá at Ljósafelli einans hevur havt fiskiloyvi uttan fyri markið, so má sigast at hann hevur klárað seg nøkulunda. Nú gav Flemish Cap óvanliga lítið í ár av onkrari orsøk men fiskarí er ofta ójavnt frá einum ári til annað.

Spurdur um orsøkina til at Ljósafelli nú verður seldur, svaraði Mortan Johannesen óbeinleiðis at tað hevur við aldur og arbeiðsbyrðu at gera.

– Nú hava vit Enniberg í forvegin at hugsa um og tá man er blivin 67 ár, so… Tað er hóast alt avmarkað hvussu nógv man orkar at hava um hendi.

Umvælingar av bátum




Einasta góðkenda glasfiburbátasmiðjan í Føroyum.

Alt glasfiburarbeiði verður gjørt í góðkendum verkstaði.

Alt umvælingararbeiði á einum staði: leingjan av bátum, søla og íseting av motorum, - og so hava vit teir sera væl umtóktu slengrikjølarnar.

*Ring ella kom inn á gólvið.*

*Ein góð tænasta!*

AWI BOATS SERVICE SP/F
Rókahavnin 10 · FO-620 Runavík
Tel 448585 · Fartel 218585 · Fax 448785
awi@post.olivant.fo · awi.fo



Føroya Banki í Niels Finsensgøtu nýtt andlit

Í hesum sambandi verður bjóðað til

móttøku

fríggjadagin 3. september frá kl. 15-17

Á skránni verður okkurt lætt til matna og livandi tónleikur við Lenu & Niclasi, Páll Finnur Páll og Martin Joensen Band.

Øll eru hjartaliga vælkomin.

FØROYA BANKI

petur & petur • 320870